**HÚS/STÓR ÍBÚÐ YNSKIST**
til leigu í Vesturbýnum til par við einum barni. Vit søkja eftir einum vælhildnum húsum/stórari, góðari íbúð til leigu í eitt longri áramál, t.v.s. 5-7 ár fram. Vit eru sera røkin sjálvi og kunnu taka eina hond í, um so skuldi verið, bæði innan og uttan. Vit kunnu gjalda kr. 6.000,- v/ hita. Vinarliga latið okkum hoyra frá tykkum skjótast gjørligt.
*Bill. mrk. 1210-8*

**KJALLARAÍBÚÐ**
í Havn til leigu skjótast gjørligt. Lítil køkur, bað og tvey kømur. Leiga 3.000 kr. um mánaðin uttan ljós og hita. Depositum kr. 5.000,-
*Bill. mrk. 1210-3*

**EINLIGUR PÁPI**
við einum barni, søkir íbúð í Eysturoynni, helst í Sundalagnum, gjaldi til tíðina, royki ikki.
*Tlf. 423061*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
í Havn ella nærhendis til trúgvandi fólk, má hava 2-3 kømur.
*Tlf. 226629*

**KAMAR YNSKIST**
beinanvegin, eg royki ella drekki ikki. Tað skal vera í Klaksvík ella Tórshavn. Vinarliga ring
*tlf. 226236*

**KAMAR TIL LEIGU**
í vesturbýnum til leigu við atgongd til køk og bað.
*Tlf. 221158 - 313799*

**HJÁLP**
Mamma við dóttir søkir eftir stórari íbúð ella lítlum húsum fyri uml. 6.000 kr. um mðr. v/ljósi og hita. Helst vera íbúð ella hús, har man kann hava húsdjór. Um nakar hevur íbúð ella hús at leiga okkum, vinarliga ring skjótast gjørligt.
*Tlf. 226631 e. kl. 20*

**HÚS ELLA ÍBÚÐ YNSKIST**
Í Runavíkar-, Tofta- ella Gøtu kommunu ynskja vit hús/íbúð til leigu frá 1. des. 2001 ella skjótast. Eru friðarlig og ganga væl um.
*Tlf. 447067*

**HÚS TIL LEIGU**
Hús í Havn til leigu fra 1. januar - 30. juni.
*Tlf +33 680289996 e-mail andreas@faroe.com*

**KAMAR YNSKIST**
Kamar ynskist til leigu í Tórshavn skjótast gjørligt.
*Tlf. 361452*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Par við einum barni ynskir íbúð í Havn ella nærhendis. Eru friðarlig og fara væl um. Ring til Anju á
*Tlf. 252803*

## Dansur

**FØROYSKUR DANSUR**
Dansa verður í bygdarhúsinum í Kollafirði fríggjakvøldið 9. nov kl. 21.00.
*Norðstreymoyar Dansifelag*

## Dýr

**HUNDAHVØLPAR**
Fittir hundahvølpar latast djóravini. Teri eru 8 vikur gamlir. Mamman er lítil av vøkstri og sera spøk.
*Tlf. 447495 - 283395*

**HESTUR TIL SØLU**
Sera fittur svartur íslendskur hestur er til sølu vegna plásstrot. Hesturin er 3 1/2 ára gamal.
*Tlf. 313892 - 213892*

**KETTLINGAR**
Ein frensur og ein ketta verða latnir djóravinum.
*Tlf. 210560 - 423572*

**SJEFARI/LABRADOR**
tík fæst til djóravin. Hon er 1/2 ár. Kurv, reim og skálin fylgja við.
*Tlf. 257346/375685, spyr eftir Vibeke*

## Fundir

**PENSIONISTAFELAGIÐ Í HAVN**
kemur saman í Losjuni mikukvøldið 7.11. kl. 19.00. Beata L. Samuelsen tosar um eldraøkið.
*Nevndin*

## Húsarhaldstól

**TIL SØLU**
Brúkt uppvaskimaskina til 6 pers. av merkinum Morris bíliga til sølu.
*Tlf. 373380*

**TIL SØLU**
Komfýrur í góðum standi til sølu fyri 1000 kr.
*Tlf. 315570 e. kl. 17*

**YNSKIST**
Er tað nakar, ið hevur ein Master Mixara av tí gamla slagnum at selja mær?
*Tlf. 456791*

**MIKSARI**
Ein miksari av slagnum Ballerup ynskist til keyps.
*Tlf. 456791*

**TIL SØLU**
Husquarna turkiskáp til at turka klæði í til sølu fyri 1.000 kr. Nýprísur um 4.600 kr.
*Tlf. 316062*

## Innbúgv

**TEAK SOFABORÐ**
70x155 cm. við einum lenistóli til sølu.
*Tlf. 314410*

**LÚTAÐ HORNASOFA**
við grønum hyndum til sølu fyri 3.000 kr. Er sera væl hildin.
*Tlf. 217180*

**GÓÐ BOXMADRASSA**
90x200 til sølu fyri 1200 kr.
*Tlf. 333110 - 251222*

**TIL SØLU**
Hvítt skrivaraborð við reol til barnakamar til sølu fyri 200 kr.
*Tlf. 315570 e. kl. 17*

**REOL TIL SØLU**
Reol í góðum standi til sølu fyri 1000 kr., nýprísur 2200 kr. Barnasong, kann takast út, úr myrkum træi til sølu fyri 1000 kr., nýprísur 2000 kr. Ring um kvøldið ella í døgurðatímanum á
*tlf. 319460*

**DUPULTSONG TIL SØLU**
Chr. 4 180 x 200 cm. Dunlopillo madrassir og elevatiónsbotnar kr. 2.000.
*Tlf. 314740*

**SOFA**
Blá, sera góð at sita í, men litfarin, fæst sera bíliga.
*Tlf. 314705 ella 252601*

**MUSIKKBONKUR**
Hvítur musikkbonkur fæst við at koma eftir honum.
*Tlf. 314705 ella 252601*

**REOL TIL SØLU**
162 breið, 186 høg, 40/49 cm djúp, pláss til sjónvarp, video og stereoanlegg, sær út sum nýggj.
*Tlf. 316183*

**ANTIK SKRIVARABORÐ**
Myrkt beisað antik skrivaraborð v. stóli til sølu.
*Tlf. 316999*

**INNHURÐAR**
Ljósar, vælhildnar Swedoor, uttan karm, 6 stk. 80-hurðar, og 1 stk. 70-hurð, til sølu fyri kr. 300,- pr. stk.
*Tlf. 319263*

**TIL SØLU**
Beisaður stereobonkur við 3 hillum og einari skuffu, hædd 1 m. br. 55 cm., til sølu fyri 200 kr.
*Tlf. 255279*

**TIL SØLU**
Antik møblar so sum sofa, skáp o.a. Kom og gev eitt boð.
*Tlf. 321444 - 222211*

## Lutaseðlar

**SUNNUDAGSSKÚLIN HJÁ**
Notarius Publicus hevur drigið hesar vinningar av lutaseðunum fyri Sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini:
1. 854 – 2. 41 – 3. 11857 – 4. 7626
5. 8036 – 6. 48997. 7884 – 8. 9135
9. 162 – 10. 787 – 11. 278 –
12. 8601 – 13. 3371 – 14. 4939 –
15. 11533 – 16. 7901
Vinningarnir fáast við at skriva navn, bústað og telefonnummar á baksíðuna á vinnandi seðlinum og senda hann til Heimamissiónina, FO-437 Nesvík.
*Takk fyri stuðulin*

**TARVAMYKJUKAPPING**
Seðil nr. 002 vann tarvin á tarvamykjukappingini hjá Haldórsvíkar Avhaldsfelag. Hjartaliga takk fyri stuðulin.
*Nevndin*

## Samband

**SAMBAND SØKIST**
59 ára gamal einkjumaður ynskir at koma í samband við kvinnu, ið er umleið á sama aldri. 100% tagnaðarskylda.
*Bill. mrk. 1212*

## Sjavs

**SJAVSKAPPING**
verður í LÍF-húsinum hóskvøldið kl. 18.30.
*LÍF*

## Súkklur

**MZ ETZ 150**
Brúktur motorur í góðum standi ella motorblokkar til mína EZ ETZ 150 ynskist til keyps. Mær tørvar eisini ymiskar aðrar eykalutir. Hevur tú okkurt, ella veitst hvar tað kann skaffast, so ring vinarliga á
*tlf. 311926 e. kl. 16*

**HYGG HER!!!**
Honda CB 500 motorsúkkla, árg. 77, koyrir væl og sær gott út til sølu.
*Tlf. 255243*

**SÚKKLUR TIL SØLU**
Ein Juventus Weild Cat 16" grøn dreingjasúkkla 1 gear og fótbremsu einans kr. 400,00. Ein Releigh MAX 24" metallic grøn dreingjasúkkla 10 gear (sum nýggj) einans kr. 1.400,00 .
*Tlf. 315741*

**SCOOTARI TIL SØLU**
Peugeot Speed Fighter, árg. 6/97, gulur og bláur, koyrir væl, til sølu fyri 13.000 kr. Nýprísur 23.000 kr.
*Tlf. 222888 / 223311*

**SKUTARI TIL SØLU**
Ein SYM skutari, koyrt 6.000 km, 1 ára gamal til sølu.
*Tlf. 315723*

**MOTORSÚKKLA**
Motorsúkkla ynskist til keyps fyri 20.000 kr.
*Tlf. 211445*

## Teldur

**TELDUSPØL TIL MACINTOSH**
Hesi MacPlay telduspøl: Starfleet Academy (4 fløgur), Fallout, Titanic, Duke Nucem (3D) og Warcraft II (Tides of Darkness), til sølu (helst samlað) fyri 400 kr. íalt. Tlf. 311581 ella
*tlf. 259180 e. skúlatíð*

**TELDA TIL SØLU**
Intel Pentium III, 850 Mhz, 256 Mb Ram, 20 Gb HD, 17" skerm, Cd brennari, 16xDVD, 2x32 Mb Ragemax Furk Grafikkort og Windows me. Til sølu fyri 9.500 kr.
*Tlf. 314111*

**FUJITSU SIEMENS PIII**
telda bíliga til sølu. 500Mhz, 64SCSI MbRAM, 20Gb HD, 17,4" 64x Cd/DvD, SupraSST 56k v.90 Voice/fax modem plus m.a og forrit sum td. WindowsXP & OfficeXP (en), Norton Antivirus 2002, Norton Personal Firewall 2002 & Neotracer 3 Pro.
*Ring á tlf. 226493 (Johan) og fá meir at vita*

**FARTELDA**
Torshiba 64Mb ram, 233Mhz, 4 GB hardisk ,TFT skerm, lithiumbattarí - 2 ár.
*Tlf. 250627 ella e. kl.19 á 332627*

**TELDA**
Intel Pentium III 733Mhz; 128MB Ram; 20,4GB HD; 17" Philips skerm; Canon litprentara; 48XCD Rom; grafik-, ljóð- og netkort; nógv programmir m.a. MS Office 2000 Pro, uml. 2500 MP3 nummur. 8500 kr.
*Tlf. 224546*

## Tónleikur

**TIL SØLU**
Eitt Kawai orgul, hevur 2 manualir og fótpedal, til sølu fyri uml. kr. 5.000.
*Tlf. 441800*

**TIL SØLU**
Ein Harmonika 96 bassar, fleiri ljóð til tangentar og 5 ljóð til bassar. Til sølu fyri uml. kr. 6.000.
*Tlf. 441800*

**GUITAR EFFECT**
Line 6 POD og Floorboard til sølu fyri einans kr. 7.000 kr. Telduforrir fylgir við. (SoundDriver, Pro-tools).
*Tlf. 222132 & 316332*

**KEYBOARD TIL SØLU**
»Roland E-35« fyri 4500 kr. við sustan pedal og »soft case«.
*Tlf. 322909*

## Ymiskt

**BASARUR**
verður í KFUK í Havn hósdagin 8. nov. kl. 19 við eydnuhjóli, borðsølu, fiskibrunni, køkutombola og kondittaríi. Vit taka við tøkk móti lutum.
*KFUK, Varðagøta 9*

**JÓLASØLUHUGNI**
verður í bygdasalinum á Skála leygardagin 1. des. kl. 16
*Skála Ítróttarfelag*

**TIL SØLU**
Ein mynjaður oljutangi á 1.200 ltr. til sølu.
*Tlf. 444715 - 215715*

**TIL SØLU**
WC kumma og hondvask (óbrúkt) til sølu fyri 500 kr.
*Tlf. 315570 e. kl. 17*

**»BERIT«**
Er tað nakar, ið kann selja mær djúpar tallerkar til stellið »Berit«, ið ikki longur fæst til keyps?
*Tlf. 456637*

**ÁRSVEITSLA**
Tann vælumtókta ársveitslan hjá Hósvíkar Róðrarfelag og Bygdarfelagnum Varðanum verður leygarkvøldið 24. nov. kl. 19. Góður matur og gott undirhald verður. Tað sera vælumtókta orkestrið Moonshots spæla til dans. Atgongumerkir á 175 kr. fáast í handlinum hjá Jóannesi til og við 18. nov. kl. 22.
*Hósvíkar Róðrarfelag/- Bygdafelagið Varðin*

**ÁRSVEITSLA**
Ársveitslan hjá bóltfelagnum Royn verður leygarkvøldið 10/11 kl. 19. Atgongumerki á 200 kr. kunnu keypast í pylsuvogninum í Hvalba frá mánadegnum 5/11 til og við týsdagin 6/11.
*Bóltfelagið Royn*

**MIÐVINGAR ÚTI OG HEIMA**
Árliga bygdarveitslan, »Miðvingar úti og heima« verður leygarkvøldið 24. november, klokkan 19:30. Nærri verður lýst seinni.
*Gleimur*

**ÆTTARGRANSKING**
Skeið í ættargransking á teldu. Winfam skeið verður leygardagin 10. november 2001 í teldustovuni á Venjingarskúlanum. Skeiðið verður allan dagin. Kostnaður kr. 100,00 fyri limir og kr. 200,00 fyri ikki limir. Teldupostur: dali@kallnet.fo Telefon: 312957Fartelefon: 217366
*Telefon: 312957*

**TIL SØLU**
8 fermetrar hvítar veggjaflísar til sølu. Std. 20x15.
*Tlf. 318147*

**FARTELEFON**
Ein Ericsson T18 GSM til sølu.
*Tlf. 316183*

**TIL SØLU**
Nokia 450 fartelefon til sølu fyri 500 kr.
*Tlf. 312092*

**HYGG HER**
Til øll í Runavíkar kommunu, kunnu tit goyma øll blikk til okkum. Vinarliga Nýggjársnevndin, Eli tlf. 448810, Thomas P. 448701 ella Atli 449233.
*Tlf. 448810*

**TIL SØLU**
Ein óbrúkt Erisson T29 fartelefon við eyka útgerð.
*Tlf. 223678*

**MARKNAÐARDAGUR**
verður í Ítróttarhøllini í Runavík 1. des. Tilmelding á tlf. 447655.
*NSÍ*

**REKLAMUSKELTI**
Óbrúkt, elektriskt reklamuskelti, har áskriftin kann broytast, til sølu fyri 700 kr.
*Tlf. 313484*

**YNSKIST**
Er nakar, ið kann selja mær eina brúkta ella defekta Ericsson GF 778e fartelefon?
*Tlf. 259220*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

Skrásetingar-nr. P/F 3251
Navn: P/F Ziska
Adressa: Løkjatún 1, 160 Argir
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 29.10.2001
Viðtøkudato: 29.10.2001
Kapitalur: Kr. 500.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 500.000,00 kontant til kurs 100.
Stovnarar: Kári Justinussen, Tórugøta 18, 100 Tórshavn og Jóhan Ziskason, Mýrisnípuvegur 14, 100 Tórshavn.
Nevnd: Kári Justinussen, Tórugøta 18, 100 Tórshavn (formaður), Jóhan Ziskason, Mýrisnípuvegur 14, 100 Tórshavn, Malan Martinsdóttir Justinussen, Tórugøtu 18, 100 Tórshavn og Ziska Fríðin Ziskason, Torkilsgøta 10, 188 Hoyvík.
Stjórn: Jóhan Ziskason, Mýrisnípuvegur 14, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av nevndarformanninum og stjóranum í felag.
Grannskoðari: : KPMG Statsaut. Revisorar Sp/f, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 29.10.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og tænastur í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 1. november 2001

Kristin Balle

Lesið Sosialin

Í Býin - hvønn hósdag

Lýsið við brúktum bilum

Sosialurin
www.sosialurin.fo



# HEILSANIR


**Góði elskaði Elvis**
Hjartaliga tillukku við 22 ára degnum, ið var í gjár .....eg elski teg.
**Heilsan tín Barbara**


**Góði pabba**
Tillukku við 55 ára degnum. Takk fyri, at tú hevur føtt meg so væl.
**Heilsan norðoyingurin**


**Góða Fríðhild**
Tillukku við 50 ára degnum. Ikki er altíð so lætt at koma úr seingini.
**Heilsan vit á Fløttinum**


**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við 70 ára føðingardegnum 7. nov. Eisini ein heilsan til abba. Takk fyri at tit eru so góð við okkum. Vit koma øll í føðingardag leygarkvøldið.
**Kærar heilsanir, ommubørnini**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................
......................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ......................................................................
Bústaður: ......................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**

LØGMANSSKRIVSTOVAN

# Starvslesandi í Brüssel

## (Stagiaire)

Søkt verður eftir lesandi til Sendistovu Føroya í Evropasamveldinum. Starvstíðin er sett til at verða frá 1. februar 2002 til 31. august 2002 ella fyri lestrarhálvárið.

**Uppgávur**
Tann, ið settur verður, verður partur av dagligu arbeiðsgongdini á sendistovuni í samskiftinum við Evropasamveldið við serligum atliti at samskifti viðvíkjandi handli og fiskivinnu.

**Førleikakrøv**
Tann, ið settur verður, eigur at vera lesandi føroyingur við hægri háskúla, sum í minsta lagi hevur útbúgving á bachelor stigi.

Umsøkjarar eiga at hava góð samstarvsevni, vera áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar eiga harumframt at vera stinnir í føroyskum og enskum máli.

**Starvsstaðið**
Starvsstaðið er Sendistova Føroya í Evropasamveldinum, Brússel, sum er ein samrunnin partur av Løgmansskrivstovuni - uttanlandsdeildini.

**Setanartreytir**
Starvið verður skipað eftir teim reglum, ið eru galdandi fyri starvslesandi á staðnum. Starvið er ólønt. Tó verður veittur stuðul til bústað.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Nærri upplýsingar eru at fáa við at venda sær til Herluf Sigvaldsson, deildarstjóra, tlf. +298 35 10 10.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast

**Løgmansskrivstovuni**
Tinganes
FO-100 Tórshavn

Umsóknir skulu vera á Løgmansskrivstovuni í seinasta lagi 26. november 2001. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Løgmansskrivstovan er fyrisiting hjá løgmanni og varaløgmanni. Løgmansskrivstovan er skipað í tríggjar deildir og tvær tænastueindir og hevur í høvuðsheitum tvørvegis og samskipandi uppgávur, eitt nú landstýrisfundir, uttanlandsmál, umboðan, starvsfólkapolitikk, fyrisiting, nýskipan og sjálvstýrismál.

Sosialurin